## Nú er tað álvara

Danska stjórnin er troytt av, at lond kring Norðpólin koma við meiri ella minni skemtiligum krøvum um rættindi til póløkið. Tí hava Per Stig Møller, uttaníkisráðharri, og Hans Enoksen, landsstýrisformaður, boðið uttanríkisráðharrunum í Noregi, Kanada, Russlandi og USA til Grønlands í næstu viku at tosa um málið. Per Stig Møller sigur við Ritzau, at londini kring pólin eiga at gera sær greitt, at rættindi til økið hava eisini skyldur við sær.



## Aleqa hevði kenning

Grønlendska landsstýriskvinnan í fíggjar- og uttanríkismálum, Aleqa Hammond, er meldað til løgregluna í Nuuk, tí hon sýtti fyri at rinda fyri ein hýruvogn, sum hon hevði leigað. Landsstýriskvinnan hevði verið í veitslu í sambandi við, at tingsetan hjá Landstinginum endaði. Har hevði hon drukkið í meira lagi, og tá hon leigaði ein hýruvogn at koyra seg til hús, sýtti hon fyri at gjalda. KNR sigur tó, at málið kemur ikki í rættin.



*Bjargingarbáturin Lív hevði sína fyrstu uppgávu á royndartúrinum, tá hann var úti í Nólsoy eftir eini kvinnu, sum hevði nógva pínu. Flutningurin gekk bæði skjótt og væl. Lív hevur børu umborð og kann gera slíkar uppgávur, um tørvur er á tí*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Hugsa um trygdina

**- Alt arbeiði, sum vit gera, er ókeypis. Okkara limir fara frá húsi og heimi at hjálpa øðrum, tá boð eru eftir okkum, og tí vilja vit eisini tryggja okkum og teimum, vit veita hjálp, sum best. Ein kompensatión fyri okkara tænastu er, at limir sleppa ókeypis á skeið, sigur Edvard Kjeld, sum í mong ár hevur verið partur av bjargingarliðnum í Havn**

BJARGING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggi bjargingarbáturin Lív er 12 metrar langur og kemur soleiðis ikki undir serliga strong krøv hjá Skipaeftirlitinum.

- Vit fingu at vita frá Skipaeftirlitinum, tá vit lótu bátin byggja, at báturin ikki er undir teirra eftirliti, men kortini gjørdu vit av at hava Skipaeftirlitið við í tilrættaleggingini og allari bygginini. Tískil er báturin, nú hann er komin higar til lands, eisini góðkendur.

Tað sigur Edvard Kjeld, nevndarlimir í Havnar Bjargingarfelag, sum vegna bjargingarfeløgini er takksamur fyri væl-vildina og samstarvið, sum verið hevur við Skipaeftirlitið.

Undir bygginini hevði Edvard eftirlitið við tí maskintøkniliga, meðan Jens Hansen, sum eisini er í nevndini í Havnar Bjargingarfelag og hevur umsjónina við bátinum, í fyrsta lagi hevði ábyrgdina av tí nautiska.

Edvard sigur, at alt arbeiði, sum bjargingarfeløgini gera, er ókeypis, og soleiðis er eisini við umsjónini av bátinum.

- Okkara limir fara frá húsi og heimi at hjálpa øðrum, tá boð eru eftir okkum, og tí vilja vit eisini tryggja okkum og teimum, vit veita hjálp, sum best. Ein kompensatión fyri okkara tænastu er, at limir sleppa ókeypis á skeið.

Hann sigur, at tað er eitt krav, sum bjargingarfeløgini seta, at skiparin á Lív í minsta lagi hevur dugnaskaparroynd í sigling, og at motorpassarin í minsta lagi hevur havt skeið í motorlæru. Allir skulu hava verið á trygdarskeiði.

- Hetta eru førleikakrøv, sum vit seta, og tí fáa teir, sum brúka tíð upp á hesar útbúgvingar og skeiðvirksemi, hesi ókeypis, sigur Edvard.

Lív hevur tveir scaniamotorar, sum eru 500 hk. hvør. Hesir motorar eru sera væl dámdir og nógv brúktir umborð á bjargingarbátum av hesum slagi.

- Lív er ógvuliga góður at arbeiða við. Báturin kann á sløttum sjógvi og ongum ráki sigla tvær míl um tíman eftir síðuni. Hann hevur eisini tað, sum rópt verður ”krasj-stop”, sum merkir, at Lív við fullari ferð kann liggja stillur upp á næstan onga tíð – ella bert upp á longdina á bátinum sjálvum, sigur Edvard Kjeld.



*- Lív er ógvuliga góður at arbeiða við í sjónum. Hann kann sigla eftir síðuni og hevur eisini ”krasj-stop” sum ger, at hann kann liggja stillur eftir næstan ongari løtu, sigur Edvard Kjeld*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Altíð mannaður

Tað eru bjargingarfeløgini í Havn, Nólsoy og Kollafirði, sum eftir eini skipan koma at hava bátin liggjandi tøkan til uppgávur, og tað verður Jens Hansen, nevndarlimur í Havnar Bjargingarfelag, sum kemur at hava umsjónina við bátinum.

- Lív kemur at liggja bæði í Havn, Kollafirði og Nólsoy, og fýra mans verða knýttir at bátinum í eini skiftisskipan, meðan fýra aðrir verða tøkir sum ”backup” menn, um onkrum skuldi borist frá, tá báturin verður kallaður til uppgávur.

Edvard Kjeld sigur, at í minsta lagi ein skipari, ein navigatørur, ein maskinmaður og ein bjargari verða knýttir at bátinum í senn.

- Er talan um bráðfeingis sjúkraflutning, kann báturin fara avstað við tveimum monnum, skipara og maskinmanni. Soleiðis kann eisini gevast pláss fyri tveimum portørum. Annars verður manningin lagað eftir uppgávuni, sigur hann.